gult cyan magenta svart



# 3rd Tórshavn International

*Hóast teir ikki fáa gjørt nakað við toppin, so hava føroysku telvararnir longu nú fingið sær nøkur stig í sterku talvkappingini*



*Carl Eli Nolsøe Samuelsen gjørdi besta føroyska hálið, tá hann vann á dananum, Steffen Pedersen*

***Mynd: www.faroechess.com***

6/10 fór sera sterka talvkappingin 3rd Tórshavn International av barkastokki í Norðurlandahúsinum. Karmanir um kappingina eru sera góðir, og telvararnir, sum luttaka, eru væl nøgdir við umstøðurnar — bæði stórmeistarar, altjóða meistarar og amatørarnir. Hetta sást eisini aftur í fyrsta umfari, har einki talv endaði javnt — stríðsandin var í hásæti á øllum 15 borðunum. Soleiðis sum úrslitini lagaði seg, vóru eingi yvrraskilsir í fyrsta umfari - uttan tað eina.

21 ára gamli havnarmaðurin Carl Eli Nolsøe Samuelsen vann á dananum og altjóða meistaranum Steffen Pedersen. Carl Eli tók øll av bóli, tá hann ruddiliga spældi mótstøðumannin út av borðinum. Steffen Pedersen er nýliga úttikin til danska landsliðið og hevur eisini fingið tann eina GM normin av trimum, til tess at ogna sær heitið, stórmeistari í talvi.

Í toppinum vann unga stórtalentið úr Ukraine, Ponomariov, sera hegnisliga sítt talv við svarta fólkinum. Ukrainski unglingin var einans 13 ár tá hann gjørdist stórmeistari, og var hetta heimsmet tá. Hann verður roknaður sum eitt seriøst boð uppá ein komandi heimsmeistara.

Somuleiðis vunnu eisini allir hinir favorittarnir síni talv, soleiðis at Carl Eli eftir fyrsta umfar lá á odda saman við hinum stórmeistarunum. Ongin annar føroyingur megnaði at fáa stig í fyrsta umfari.

Í øðrum umfari var hólmgongan á 64 puntunum nærum líka kompromisleys sum í fyrsta umfari. Bert tvey talv endaði javnt, og bæði við føroyskari luttøku. Kollfirðingurin Torbjørn Thomsen helt javnt móti russaranum Bykhovsky, sum ikki er ein og hvør. Umframt at vera venjari hjá 16 ára gamla stjørnuskotinum í kappingini, Grischuk, hevur hann vant fleiri aðrar kendar telvarar. M.a. Anatoly Karpov, sum var heimsmeistari frá 1975 til 1985, tá ein ávísur Gary Kasparov koppaði honum.

Føroyameistarin Flóvin Tór Næs telvaði eisini javnt móti Herlufi Hansen, báðir úr Havn. Flóvin hevði meir fólk á borðinum, men Herluf megnaði at fáa ævigt skák.

Eisini eydnaðist John Rødgaard at basa 13 ára gamla talentinum Olaf Berg, sum tó gav holla mótstøðu.

Hetjan í fyrsta umfari, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, mátti lúti fyri svianum Johan Eriksson, sum telvaði sannførandi og ikki gav føroyinginum nógvar vónir um annan sigurin á rað.

Havnamaðurin Heini Danielsen, sum telvar aftur í Føroyum á fyrsta sinni í sjey ár, megnaði at halda javnt móti íslendinginum Jón Viktor Gunnarson. Hesin hevur akkurát 200 ratingstig meir enn Heini, sum also ikki lat seg ræða og spældi javnt upp ímóti sterka mótstøðumanninum.

Einasta kvinnan í kappingini, Irina Krush, basti eisini einum føroyingi sunnudagin. Tað var klaksvíkingurin Terji Petersen sum var við undirlutan, tá Irina við frúgv og róki rundan um kongin hjá Terja hótti við bæði einum og øðrum.

Triða umfar 8/10 var eisini eitt sera spennandi umfar.

Topptatalvið millum Baburin IRL og Ponomariov UKR endaði javnt, eftir eitt sera neyvt talv frá báðum pørtum. Ponomariov heldur á við hugtakandi sterkari og sikrari telving.

Harafturímóti var 16 ára gamla stórtalentið úr Russlandi Grischuk náðileysur, og beindi fyri íslendinginum Hannis Stefansson, sum nýliga hevur kvalifisera seg til heimsmeistaraskapin hjá altjóða talvsambandinum FIDE. Hesin ungi russarin verður helst drúgvur at taka í longdini. Hann hevur fult stigatal.

Eisini føroyavinurin, Stewart Conquest, megnaði at halda dampin uppi við triða sigrinum á rað. Tað var fyrrverandi telvarin fyri KT Tiger Hillarp-Persson, sum mátti leggja rygg til gentlimannin úr Onglandi.

Heini Danielsen fekk aftur javnt móti sterkari mótstøðu. Hann leikti eitt gott talv móti Bykhovsky, sum tekur seg úr kappingini frá mánadegnum 11/10 eftir at hava fingið staðfest krabbamein. Sjúkan er somikið álvarslig, at viðgerin ikki kann bíða. Ein telvari í niðaru helvt fær sostatt fríumfar hvønn dag hereftir, og Terji Petersen KTF stendur fyrst fyri skotum.

Føroyameistarin, Flóvin Tór Næs, vann sannførandi móti Torbjørn Thomsen, og hevur nú hálvtannað stig.

John Arni Nilssen mátti lúta fyri Steffen Pedersen í einum endatalvi við finnu minni. Steffen er komin fyri seg aftur eftir tapið í fyrsta umfari móti Carl Eli N. Samuelsen. Hann hevur nú tvey stig, meðan John Arni hevur tað eina stigið.

Olaf Berg vann heldur óvænta á Terja Petersen, sum hevur yvir 200 ratinstig meir enn unglingin. Sera gott úrslit hjá Olafi, sum annars kom við í síðstu løtu, men skuffandi fyri Terja, sum enn ikki er komin upp á stigatalvina.

Eisini Martin Poulsen legði lítið í rating og styrkismeting, tá hann koppaði nýklækta landsliðstelvaranum Ólavi Simonsen, sum sostatt einki stig hveur fingið.

**Støðan í toppinum:**

Conquest ENG
3 stig
Grischuk RUS
3 stig
Ponomariov UKR
2,5 stig
Baburin IRL
2,5 stig
Pskhis ISR
2,5 stig
Savchenko UKR
2,5 stig

Hjá føroyingum er støðan í toppinum:

Flóvin Tór Næs
1,5 stig
John Arni Nilssen
1 stig
John Rødgaard
1 stig
Carl Eli Nolsøe Samuelsen
1 stig
Olaf Berg
1 stig
Martin Poulsen
1 stig
Heini Danielsen
1 stig

Kappingin heldur fram hvønn dag klokkan 13:00 í stóra salinum í Norðurlandahúsinum, og hava fólk hug at hyggja at, er bara at støkka inn á gólvið, tí talan er um ókeypis atgongd.



*Terji Petersen var væl og virðiliga skákaður, tá hann møtti Irina Krush*

***Mynd: www.faroechess.com***

## Fýra áhugaverd talv

*Niðanfyri verða víst trý áhugaverd talv úr triðja umfarinum, umframt at talvið hjá Carl Eli Nolsøe Samuelsen móti Steffan Pedersen eisini verður víst*

Flóvin Tór Næs (2271) — Torbjørn Thomsen (2202)
3rd Tórshavn International (3), 08.10.2000

1.e4 c6 2.d4 d5 3.exd5 cxd5 4.c4 Nf6 5.Nc3 e6 6.Nf3 Nc6 7.Bd3 a6 8.a3 dxc4 9.Bxc4 b5 10.Ba2 Ne7 11.Bg5 Bb7 12.0-0 Ned5 13.Ne4 Ra7 14.Re1 Be7 15.Nc5 0-0 16.Ne5 Ba8 17.Qd3 h6 18.Bxf6 Nxf6 19.Nxe6 Qd6 20.Nxf8 Bxf8 21.Rac1 Bd5 22.Bxd5 Qxd5 23.Rc8 Re7 24.Qc3 Ne8 25.Nc6 Re6 26.Rxe8 Rxc6 27.Qb4 Rd6 28.Rc8 Rd8 29.Re8 Rxc8 30.Qxf8+ Kh7 31.Rxc8 Qxd4 32.h3 Qxb2 33.Qxf7 Qa1+ 34.Kh2 Qe5+ 35.f4 1-0

GM Grischuk,S (2606) — GM Steffanson,Hannes (2557)
3rd Tórshavn International Tórshavn (3), 08.10.2000

1.e4 e5 2.Nf3 Nc6 3.Bb5 a6 4.Ba4 Nf6 5.0-0 b5 6.Bb3 Bc5 7.a4 Bb7 8.d3 0-0 9.Nc3 b4 10.Nd5 h6 11.Be3 Nd4 12.Bxd4 exd4 13.Ne5 Nxd5 14.exd5 Bd6 15.f4 Bxe5 16.fxe5 Qg5 17.Qe1 c5 18.Qe4 Rae8 19.Rf5 Qe3+ 20.Qxe3 dxe3 21.Re1 g6 22.Rf3 Rxe5 23.Rfxe3 Rg5 24.Re5 d6 25.Rxg5 hxg5 26.Re7 Bc8 27.Bc4 Kg7 28.a5 g4 29.Ra7 Kf6 30.Ra8 Ke7 31.Bxa6 Bxa6 32.Rxa6 f5 33.Rb6 Ra8 34.a6 g5 35.c4 bxc3 36.bxc3 Kd7 37.Kf2 Kc7 38.Rc6+ Kd7 39.Rb6 Kc7 40.Rc6+ Kd7 41.Kg3 Ra7 42.c4 Ra8 43.Rb6 Ra7 44.Rb7+ [44.Rb7+ Rxb7 45.axb7 Kc7 46.h4 gxh3 47.gxh3 f4+ 48.Kg4 Kxb7 49.h4 f3 50.Kxf3 gxh4 51.Kg4 h3 52.Kxh3+-] 1/2-1/2

IM Bykhovsky,A (2393) — Heini Danielsen (2168)
3rd Tórshavn International (3), 08.10.2000

1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 Nf6 5.Nc3 e5 6.Ndb5 d6 7.Bg5 a6 8.Na3 b5 9.Bxf6 gxf6 10.Nd5 Bg7 11.c3 f5 12.g3 Ne7 13.Bg2 Rb8 14.exf5 Bxf5 15.Nc2 a5 16.Nce3 Be6 17.Nxe7 Qxe7 18.Bc6+ Kf8 19.0-0 Bh6 20.Qd3 Bxe3 21.fxe3 Bc4 22.Qf5 Qe6 23.Qxe6 Bxe6 24.Rad1 Ke7 25.Bd5 Rhc8 26.Rf2 Bxd5 27.Rxd5 Rc5 28.Rd1 f6 29.Rfd2 Rb6 30.a3 Ke6 31.Kf2 Rc4 32.Ke2 b4 33.cxb4 axb4 34.a4 b3 35.Ra1 Ra6 36.a5 d5 37.Ra3 Rc1 38.Kf3 h5 39.Rxb3 Rxa5 40.Rb6+ Kf5 41.Rxd5 Rf1+ 42.Kg2 Raa1 43.Rdd6 Kg5 44.Rd8 Rae1 45.Rg8+ Kh6 46.Re8 Rf5 47.Rb7 Re2+ 48.Kg1 Rff2 49.e4 Rg2+ 1/2-1/2

Carl Eli N. Samuelsen (2055) — IM Steffen Pedersen (2464)
3rd Tórshavn International (1), 06.10.2000

1.d4 Nf6 2.c4 g6 3.g3 Bg7 4.Bg2 0-0 5.Nc3 d6 6.Nf3 Nc6 7.0-0 a6 8.e4 Bg4 9.h3 Bxf3 10.Bxf3 Nd7 11.Ne2 Rb8 12.Bg2 b5 13.cxb5 axb5 14.e5 Na5 15.e6 fxe6 16.Nf4 Rxf4 [16...Rf6 17.Qe1 e5 18.Bd5+ Kh8 19.Ne6 Rxe6 20.Bxe6 Nc6 21.d52] 17.Bxf4 Nc4 18.b3 Ncb6 19.Rc1 e5 20.dxe5 Nxe5 21.Bxe5 Bxe5 22.Rc6 b4 23.Qg4 Nd7 24.Qc4+ Kg7 25.f4 Bf6 26.Rxc7 Nc5 27.Rc6 Qd7 28.Kh2 Qa7 29.Qe2 Rd8 30.Rd1 Rf8 31.Rd2 Bc3 32.Rc2 Rf6 33.Bd5 Qd7 34.Qg4 e6 35.Bg2 h5 36.Qd1 h4 37.Rxc5 hxg3+ 38.Kxg3 Qe7 39.Rc6 Rxf4 40.Kh2 [40.Kxf4+-] 40...Be5 41.Kh1 Qh4 42.Rc7+ Kh6 43.R7c4 Qg3 44.Rxf4 Bxf4 45.Bf1 d5 46.Qd3 Qe1 47.Rg2 g5 48.Qe2 1-0



# Avgerðin útsett

*FS Vágar og ÌF samdust um at útseta avgerðina um, hvør skal leika í fyrstu deild komandi kappingarár, til seinna,dystin, sum verður leiktur í Sørvági leygardagin*

Edvard Joensen

Seinni dysturin í kvalifikatónskappingini millum FS Vágar og ÌF fer at gera av, hvør fær rættin at leika í fyrstu deild komandi ár. Fyrri dysturin, sum varð leiktur í Fuglafirði leygardagin, endaði við javnleiki 2-2.

Líkindini at spæla fótbólt í Fuglafirði vóru ikki tey bestu. Tað regnaði illa, og vøllurin var sera vátur, tá byrjað varð. Og tað darvaði spælinum heilt nógv. Rættilig ferð kom ongantíð á spælið, tí menn óttaðust alla tíðina fyri at glíða. Tað kom meira enn einaferð fyri, at menn fóru skreiðandi eftir vøllinum, tá teir settu av, hóast eingin var í námind av teimum.

FS Vágar legði harðari út og var beinanveg rættiliga nær einum máli, tá innlegg úr høgru síðu kom niðar á tvørstongina og stakk út aftur á vøllin, har tó eingin var at taka ímóti.

ÍF kom, sum fráleið, meira við og hevði eisini onkrar næskar royndir.

Men sum heild gekk spælið mest aftur og fram úti á vøllinum. Tóktist stundum heldur óskipað, sum eyðsýnt var orsakað av váta vøllinum.

Tó vóru vágamenninir væl á veg aftur í gamla lagið við rópum og kjaftasliti, sum tó varð sett hart og kontant upp á pláss av dómaranum, Niklasi á Líðarenda.

Bara fáir minuttir vóru leiktir, tá FS maður í álopi varð rættiliga klossut stegðaur av ÍF leikara. Dómarin dømdi fríspark til FS Vágar, sum eisini rætt var. Men kortini hevði vágamaðurin hug at krevja meira av dómaranum. Hann vildi ivaleyst hava kort til fuglfirðingin. Men dómarin var avgjørdur og gav honum greið boð um, at her ráddi dómarin, og hann vildi yvirhøvur ikki hoyra nakað um, hvat hann skuldi døma. Seinni í dystinum fekk annar vágamaður átalu fyri at banna á vøllinum.

Tað var ÍF, sum fekk fyrsta málið í dystinum. Eitt brotsspark í 35 minutti, sum Bárður á Lakjuni uttan trupulleikar setti í netið.

Beint fyri hálvleikssteðgin gekk skjótt. Í næstseinasta minutti var FS í álopi. Bólturin var sendur burtur aftur frá ÍF málinum og endað hjá Eyðfinni Fjalsbak, sum frá umleið 30 metra fjarstøðu langaði til, og bóltinurin brast í netið. Hann rakti bóltin púra reint og helt honum væl niðri. Eitt frálíkt skot, sum leiddi hugin aftur til hollendingarnar í sjeytiárunum.

Bara ein minutt seinni hevði ÌF hornaspark í hinum endanum. Vágamenninir megnaðu ikki at fáa bóltin burtur, og hann endaði hjá tí púra ódekkaða Bárði á Lakjuni, sum við einum frálíkum fluktara dundraði hann í FS málið. Fínt mál.

Tað gingu bara fýra minuttir av seinna hálvleiki, til Eyðfinn Fjalsbak tóktist halda, at hann skuldi ikki standa aftan fyri Bárð í máltali. So tá FS fekk fríspark nakað uttan fyri brotsteigin, gjørdi hann av bara at seta bóltin beinleiðis í málið. Nakað soleiðis sá tað út hjá áskoðarunum, sum at tað tað einki hevði upp á seg.

Fleiri mál komi ikki, hóast møguleikarnir sanniliga vóru til staðar báðar vegir. Tvær ferðir kíndi bólturin - at kalla - einum tómum vágamáli,. Men fór framvið. Og móti endanum høvdu vágamenninir allar møguleikar, sum yvirhøvur fáast, at avgera dystin. Men teir fingu ikki bóltin í mál hóast øgiligt trýst á ÌF málið. Hornaspørk og skot upp á mál mestsum stóðu í kø móti dystarloki, men einki bar til. Fuglfirðingarnir bardust sum óðir og bjargaðu fleiri ferðir á strikuni. Men inn fór bólturin ikki.

Komu ikki fleiri mál, komu hinvegin kort. Eitt gult til ÍF í seinasta minutti og trý til FS Vágar, sum hevði fingið eitt í fyrra hálvleiki.

Gula kortið, sum ÍF liðskiparin fekk í seinasta minutti av dystinum var satt at siga rættiliga býtt og óneyðugt. Fuglfirðingarnir vóru ónøgdir við dómin og hildu ikki, at talan var um brot, sum átti at geva kort. Men her var dómarin ósamdur, og tað er hóast alt hann, sum tekur avgerðirnar.

Ein langur bóltur varð sendur fram í høgru síðu, og ein verjuleikari hjá FS Vágum metti, at hann kundi verja fyri, at ÍF álopsmaðurin fekk bóltin. Fuglfirðingurin, sum var tann aftari, tveitti seg á váta vøllinum fyri at røkka bóltinum, men fekk bara beinini undan vágamanninum, og bólturin fór út til málspark. Eitt rættiliga býtt kort at fáa, tá farið er undir yvirtíðina.

Javnleikurin mundi koma betri við hjá FS Vágum, enn hjá ÍF, sum nú skal royna at avgera lagnuna á útivølli. Ikki tí, uggðau fuglfirðingar seg við eftir dystin. ÌF hevur roynst sera væl á útivølli í landskappingini í summar, so hvør veit?

ÍF-FS Vágar 2-2 (2-1)
1-0: Bárður á Lakjuni (br.)
1-1: Eyðfinn Fjalsbak
2-1: Bárður á Lakjuni
2-2: Eyðfinn Fjalsbak



*Tað verður í Sørvági, at avgerðin fer at fella um, hvat lið fær seinasta sessin í fyrstu deild komandi ár*


# Hevur tú eini hús til mín?



**Føroya Tele arbeiðir í samstarvi við Tórshavnar Kommunu við at byrja dagstovn fyri børn hjá starvsfólkunum. Hús til dagstovn, ið uppfylla hesi krøv, ynskjast til keyps:**

- hús í góðum standi í Tórshavn/Hoyvík
- min. 250 m2 gólvvídd
- stórt grundøki
- góð atkomuviðurskifti
- møguligur kjallari má ikki vera undir jørð
- fyrimunur um húsini standa í barnavinaligum grannalagi og tætt við fríøki

Áhugaði kunnu ringja á tel 30 30 30. Øll tilboð verða viðgjørd í trúnaði.

FØROYA TELE

petur & petur 320 870



MAERSK AIR

# Ferðaætlan

29. okt. 2000 - 25. mars 2001

| Dagliga: | | Fráferð | Koma |
| --- | --- | --- | --- |
| Keypmannahavn - Føroyar | DM181 | 09.35 | 10.55 |
| Føroyar - Keypmannahavn | DM182 | 11.45 | 14.55 |

Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 21. - 22. des. & 2. - 3. jan

| Mánadag og hósdag: | | | |
| --- | --- | --- | --- |
| Billund - Føroyar | DM285 | 12.05 | 13.00 |
| Føroyar - Billund | DM286 | 13.45 | 16.30 |

Eykatúrar um ársskiftið:
20. - 22. des & 2. - 3. jan.

*Tað verður ikki flogið 24. - 25. - 31. des*

FLOGFELAG FØROYA
Tel 34 00 00 & 33 27 55
E-mail: travel@ff.fo & airport@ff.fo

team 85 · 31 65 11